


*Leiðari á Plátu- og Lakkeringsverkstaðnum er Páll av Teiginum, og verkførari er Johan Beder*

# Reyni Service – eitt ára garanti á Plátu- og Lakkeringsverkstaðnum

**Plátu- og Lakkeringsverkstaðurin hjá Reyni Service í Hoyvík er størsti verkstaðurin av sínum slagi í landinum. Millum 20 og 40 bilar verða avgreiddir um vikuna. Teir lakkera nú eisini við umhvørvisvinarligum vatnbaseraðum lakki**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*

Tá bilar fingu skaða fyrr í tíðini, var tað eingin í landinum, sum hevði lært at rætta buglur út og at lakkera bilar. Tað var ikki fyrr enn í 1948, tá danin Frits Jensen (1917-1990), Buglu-Jensen, kom til Føroya og byrjaði at umvæla skaðar á bilverkstaðnum hjá Sigird av Reyni í Rættará.

Navnið Buglu-Jensen fekk hann ikki, tí at hann gjørdi so nógvar buglur, men av tí at hann var dugnaligur og nærlagdur og óførur at rætta buglur út. Umstøðurnar hann hevði at arbeiða undir kunnu ikki sammetast við umstøðurnar í dag. Á plátu- og lakkeringsverkstaðnum hjá Reyni Service í Hoyvík koyrir alt sum eftir einum samlibandi. 12 mans arbeiða á verkstaðnum, harav tríggir eru lakkerar.

Verkstaðurin avgreiðir millum 20 og 40 bilar um vikuna, alt eftir hvussu stórir og umfatandi skaðarnir eru. Eisini er verkstaðurin sera væl útgjørdur, har eru t.d. tvær sproytukabinur, nútímans Caroliner upprættarabeinkir, punktsveisitól og annars alt tað sum hoyrir til ein nútímans plátu- og lakkeringsverkstað.

## Eitt ára garanti

Herfyri vóru lakkerarar hjá Reyni Service á skeið á tekniska skúlanum í Silkeborg. Danska lakkfyritøkan, Baden-Jensen, skipaði fyri skeiðinum, teir umboða Spies Hecker, ið er størsti lakkframleiðari í vesturheiminum. Serliga var tað nýggja umhvørvisvinarliga Greentec Line lakkið, ið er vatnbaserað, teir arbeiddu við og lærdu at brúka. Hetta lakkið lýkur tey strongu ES-krøvini, ið koma í gildi í 2007. Á Plátu- og Lakkeringsverkstaðnum lakkera teir longu nú við hesum nýggja vatnbaseraða og umhvørvisvinarliga lakkinum. Verkstaðurin gevur eitt ára garanti upp á allar umvælingar.




*Tann nýggi Toyota Avensis hevur vakt stóran ans, og nógvur spenningur hevur verið eftir at sæð hetta nýggja vidunrið frá Toyota.
Men í síðstu viku kundi Ronny í Lon, sølumaður hjá Reyni Service, stoltur sýna fram hetta snotuliga far*

*Mynd: Jens Kristian Vang*






*Árni Thomassen, hjálparleiðari, og Heðin Hansen, leiðari á mekaniska verkstaðnum hjá Reyni Service*

# Reyni Service - høgt tænastustøði á mekaniska verkstaðnum

**Fyri nøkrum árum síðan bleiv mekaniski verkstaðurin hjá Reyni Service í Hoyvík D.A.F. góðkendur. Nú verður arbeitt fram ímóti at verkstaðurin eisini verður TSM góðkendur. Alt fyri at geva kundunum best møguliga tænastu**

BILVERKSTAÐUR
*Magnus Gunnarsson*

Long tíð er nú liðin, síðan av Reyni(1916-1994) kom heim aftur til Føroya eftir seinna veraldarbardaga og byrjaði við egnum bilverkstaði og innstalatørvirki í Rættará í 1947.

Hann hevði tá arbeitt eina tíð hjá einum av stovnarunum av DOMI (Dansk Oversøisk Motor Industri) í Glostrup. Áðrenn hann kom heim aftur, hevði hann gjørt avtalu við teir um at umboða Morris bilarnar í Føroyum. Hetta var byrjanin til stóru bilasøluna, Reyni Service, sum vit kenna í dag.

Á mekaniska verkstaðnum hjá Reyni Service verður nógv gjørt fyri at veita viðskiftafólkunum so góða tænastu sum gjørligt. Fyri nøkrum árum síðan bleiv verkstaðurin D.A.F. (Dansk Automobilhandler Forening) góðkendur. Nú verður arbeitt fram ímóti at fáa verkstaðin TSM (Toyota Service Marketing) góðkendan. Ein arbeiðsbólkur er settur at gjøgnumføra tað sum krevst fyri at fáa verkstaðin TSM góðkendan. Hvørja viku er fundur í arbeiðsbólkinum, har tey alla tíðina seta sær nýggj mál. Verkstaðurin hevur øll nútímans tól, og mekanikarnir verða dagførdir við tí nýggjasta sum kemur fram innan teirra øki.

## SMS til kundan

Tá kundin kemur á verkstaðið við bilinum verður hann innskrivaður við navni, nummarplátu á bilinum, kontaktpersóni, telefonnummarið heima, á fartelefonini og á arbeiðsplássinum. Allar umvælingar verða gjørdar við góðkenning frá kundanum. Um talan er um eykaumvælingar, skal verkførarin seta seg í samband við kundan og greiða honum frá hvat skal skiftast og hvat kostnaðurin er. Kundin skal játta umvælingina áðrenn umvælingin byrjar. Verkførarin sendir soljóðandi SMS til teir kundar ið skulu á verkstað við bilinum dagin eftir "Mint verður á at bilur tygara hevur tíð á verkstaðnum í morgin". Hetta verður gjørt fyri at minka um teir bilar, ið ikki møta upp til ásettu tíðina.

Á mekaniska verkstaðnum arbeiða 13 mans. Verkstaðið skal haldast reint hvønn dag. Hvør maður tekur upp eftir sær sjálvum og heldur sítt egna øki reint og ruddiligt. Eisini bilarnir, sum hava verið inni til umvælingar, verða vaskaðir tá teir eru lidnir.

Tað setur sera stór krøv til bæði starvsfólk og leiðslu at halda verkstaðið og tænastuna á so høgum støði, men hetta eru treytirnar, um teir skulu verða D.A.F og TSM góðkendir, sigur Heðin Hansen, leiðari á mekansika verkstaðnum hjá Reyni Service.



*Torleif Johansen kannar ein Toyota Avensis*